## Ríkið eigur handlar

Tá íslendska stjórnin gjørdi av at yvirtaka bankan Straumur-Burdarrás Investment Bank, gjørdist íslendska ríkið samstundis handilsrekandi, tí bankin eigur donsku handilshúsini Magasin og Illum. Straumur yvirtók Magasin og Illum í síðsta mánað, tá Baugur fór í gjaldssteðg. Ætlanin var tá at finna ein nýggjan eigara, og nú vildi lagnan tað so, at tað bleiv íslendska ríkið. Umframt Magasin og Illum átti Straumur eina handilsketui í Íslandi, leikuhandilin Hamleys, skreytlutahandilsketuna Goldsmiths, mótahandlarnar Whistles og Jane Norman, mótafyritøkuna Mosaic Fashion og tað bretska House of Fraser.



## Navnið ávirkar lønina

Tað ljóðar kanska ikki serliga sannlíkt, men ein kanning í Svøríki vísir, at hjá innflytarum hevur navnið týdning fyri, hvørja løn tey fáa. Kanningin umfatar 641 fólk, sum høvdu strikað síni afrikonsku, asiatisku ella eysturevropeisku nøvn og fingið sær svensk nøvn ístaðin fyri. Tað loysti seg fíggjarliga í hvussu er, tí aftan á navnabroytingina fingu tey í meðal 141 prosent meiri í løn um mánaðin, sigur DR. Niels Westergaard-Nielsen, sum er professari á Handilsháskúlanum í Århus, ivast ikki í, at myndin er tann sama í Danmark sum í Svøríki.

# Handilin hjá Reyða Krossi letur aftur - fyribils

**Tey, sum hava ørindi í endursýtsluhandlinum hjá Reyða Krossi á Bryggjubakka, koma á læstar dyr í hesum døgum. Men tað er bara fyribils, sigur Suni Vinther, formaður í Reyða Krossi**

BÝARLÍV

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*




*Framtíðin hjá handlinum á Bryggjubakka verður eitt av evnunum á aðalfundinum hjá Reyða Krossi Føroyar tann 22. mars.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Mong munnu fegnast um, at tað eru heilir fýra endurnýtsluhandlar í Havn. Men í løtuni er handilin hjá Reyða Krossi á Bryggjubakka læstur, og pappír sett upp fyri vindeyguni. Á einum skelti stendur, at handilin er stongdur vegna serligar umstøður og mangul upp á fólk.

Suni Vinther, formaður í Reyða Krossi Føroyar sigur við Sosialin, at handilin er latin aftur fyribils, tí ávísar broytingar skulu gerast.

- Tey, sum hava rikið handilin sjálvboðið seinastu árini, eru nakað fá. Og so er handilin ov trongur. So her skulu onkrar broytingar til, sigur Súni Vinther.

Men hóast tey í løtuni eru ov illa mannað, er ætlanin ikki at søkja eftir fleiri hjálpandi hondum í fyrsta umfari. Fyrst skal framtíðin hjá handilinum til viðgerðar á aðalfundinum hjá felagnum, sum verður tann 22. mars.

Sambært formanninum taka fólk væl undir við endurnýtsluhandlinum hjá Reyða Krossi. Innlating av vørum er hvønn mikudag og mikukvøld, men fólk koma eisini við tingum hinar dagarnar í vikuni. Ofta seta tey vørurnar niðri í bókabúðini á veghæddini, og hóast tey í Reyða Krossi eru takksom fyri lutirnar, hava tey ikki orku til at fáa lutir til høldar hvønn dag.

Framtíðin hjá handlinum hjá Reyða Krossi verður sum sagt viðgjørd á aðalfundinum tann 22. mars, og tá fáa vit helst meira at vita um hann.



## Tilhaldið 11 ár á baki

Sjálvan grækarismessudag verður opið hús í Tilhaldinum í Tórsgøtu í Havn, nú húsið hevur 11 ára føðingardag.

Á Grækarismessu, hósdagin 12. Mars, hátíðarheldur Tilhaldið 11 ára føðingardagin.

Føði ngardagurin byrjar kl. 14.00 og skráin er soleiðis:

Felagssangur
Vælkomin: Jákup Lindenskov, nevndarformaður
Felagssangur
Gestarøðari: Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóri í Tórshavnar Kommunu
Felagssangur

Wanja Petersen, leiðari í Tilhaldinum sigur, at øll eru hjartaliga vælkomin at fáa sær ein drekkamunn og heimagjørda lagkøku í kjallaranum og á 1. hædd.

*Rd.*

# Lýsa rættin hjá føroyskum pápum



**Hvørji rættindini hava føroyskir pápar, og hvør er teirra støða, tá teir ikki búgva saman við børnunum? Í næstu viku skipar Javnstøðunevndin fyri tveimum tiltøkum um evnið**

JAVNSTØÐA

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Arbeiðið hjá javnstøðunevndini snýr seg ikki bara um rættin hjá kvinnum. Í næstu viku skipar nevndin fyri tiltøkum í Havn og í Fuglafirði, har rætturin hjá mannfólkum verður viðgjørdur.

Spurningarnir, sum verða til umrøðu eru hesir: Hvør hevur leikluturin hjá pápum verið fyrr, og hvussu hann er nú? Hvør er støðan hjá pápum í Føroyum, tá teir ikki búgva saman við børnunum? Og hvørjar reglur hava pápar at halda seg til í mun til samveru og foreldramyndugleika?

Javnstøðunevndin sigur, at tiltakið hevur til endamáls at økja um kunnleikan til páparættindi í føroyska samfelagnum og til, hvussu støðan hjá pápum í Føroyum er í mun til børnini, tá ið pápin og mamman ikki búgva saman.

Tey, ið leggja fram, eru: Jørgen Lorentzen: Leiklutinurin sum pápi og rættindi hjá pápum í søguligum og nútíðar høpi. Jørgen Lorentzen er søgufrøðingur og granskari við Lærda háskúlan í Oslo.

Lene Moyell Johansen: Foreldramyndugleiki og samvera. Lene Moyell Johansen er løgfrøðingur og fulltrúi hjá Ríkisumboðnum.

Solby Eliasen, journalistur verður orðstýrari og tiltøkini í Havn og í Fuglafirði eru ókeypis og almenn sigur Javnstøðunevndin.